


# KOLL-VELTANDI MYNDIR




Jacob August Riis (1849-1914)

**VERULEIKAFATANIN** HJÁ **NEW YORK'ARUM** VARÐ SKAKAÐ, TÁ **JACOB A. RIIS** AVDÚKAÐI ARMÓÐINA Í **FÁTÆKRABÝLINGUNUM** Í 1880'UNUM. **MYNDIRNAR** HØVDU **STÓRAR** SOSIALAR **AVLEIÐINGAR** VIÐ SÆR



MYNDIR
Rigmor Dam
rigmor@sosialurin.fo

**HOW THE OTHER HALF LIVES** EFTIR JACOB A. RIIS ER FRÁ 1890. HETTA VAR NÝSKAPANDI DOKUMENTARISTISK BÓK VIÐ MYNDUM OG SØGUM UM TEY Á BOTNINUM. HON TELIST Í DAG MILLUM KLASSIKARARNAR Í AMERIKONSKUM BÓKMENTUM

Hóast hugtakið dokumentarisma er av nýggjari uppruna, var tað júst hetta, sum danski amerikanarin Jacob A. Riis framdi, tá hann gekk runt millum kroysurnar í fátækrabýlingunum í New York við einum einføldum myndatóli og spildurnýggja undrinum blitsinum: Hann dokumenteraði fyri øllum landinum og fyri alla framtíð ómenniskjaligu livikorini í heimsins skjótast vaksandi og máttmiklasta býi, New York.

## Fekk ein amerikanskan kjans

Tað var seinast í 1800 talinum, at hin fátæki tilflytarin úr Danmark fekk ein kjans sum politiraportari á blaðnum New York Tribune.

Upprunaliga var Jacob A. Riis ein fátækur dansku timburmaður sum, eins og túsundatals onnur, leitaði sær eydnuna í nýggja heiminum vestanfyri.

Hann kom til USA í 1870 og aftan á nøkur svong og niðrandi ár sum landastrok og leysarbeiðari, har hann var um reppi at missa mótið, var hann so heppin at verða settur í starv sum journalistur á New York Tribune. Nøkur ár og nógvar viðurkenningar seinni eisini á hámetta blaðnum The Sun.

Í ørindum sum politiraportari fekk hann høvi at koma inn í djúpastu loynikrókarnar í fátækrabýlingunum á Manhattan, har Soho, East Village og Chinatown eru í dag. Hetta vóru øki, har tú skuldi halda teg innandura, tá myrkrið fjaldi skuggarnar í smogunum; har armóðin var so nívandi og lógarbrotini so lemjandi, at tey toldi ikki dagsins ljós.


*Rúsdrekka og -evnismisnýtslan var umfatandi í fátækrabýlingunum. Maðurin á myndini er opiumsmisnýtari, sum var ein stórur trupulleikin í 18. og 19. øld.*

## Avdúkaði tað ljóta

Tað óvanliga, og fyri nógvar lesarar provokerandi, við greinunum hjá Riis var, at hann dokumenteraðu samfelagsins ljótastu síður við myndum og teksti. Vanliga vóru greinirnar bara tekstur. Og vanliga tóku fotografar einans vakrar náttúrumyndir ella uppstillaðar studiomyndir.

Men her var skuggasíðan av amerikanska dreyminum borðreiddur á forsíðuni aftur við morgunkaffinum. Myndir av teimum miseydnaðu tilflytarunum. Av indianarum, sum høvdu leitað sær inn í býin. Av littum eftirkomarum hjá afrikanskum trælum. Fátøkum írum, vónríkum spaniólum og snildum italienarum. Øll somul trunkað saman í skirvisligum smáttum við rottum, ruski og menniskjalorti slongt millum berføttu børnini.

Hetta, samstundis sum, at Riis sjálvur var ímyndin av amerikanska dreyminum: Fátæki tilflytarin við gullmedaljong við kærleikshárlokki um hálsin og teppinum, sum mamman reivaði hann í sum nýføðing, sum dróg út í heimin at leita sær eydnuna.

Og sum í einum veruligum ævintýri, skuldi hann so grúviliga nógv ígjøgnum, áðrenn ljósið til endans fann inn til hansara og lýsti á hansara lívsleið.

## Sosialur reformistur

Hetta var eftir at hann sum myndamaður, fyrilestrahaldari og rithøvundur, og ikki minst sum avdúkandi journalistur og reformistur, gjørdist kendur og fekk vinir og vald, so til bar at bøta um livikorini hjá veikastu borgarunum.

Ikki við europeiska olmussutankanum sum grundvøllur, men við at stuðla tiltøkum og at vera virkin í Good Gowerment rørsluni, sum stríddist fyri at koma til lívs politiska ómegd og korruptión, og í sonevndum Settlement Houses, har endamálið var at styrkja bondini millum vælútbúnu miðalstættina og niðastu samfelagsklassarnar. Hetta vóru borgarahús, har